# Føroyingar væl umtóktir sum ferðaleiðarar



*Ferðaleiðarakvøld í Miðlahúsinum. Súsanna frá ferðaleiðaraskúlanum »Service & Co« greiðir frá*



*Súsanna tosar við næmingar á Føroya Handilsskúla í Havn, har hon greiddi frá ferðaleiðaraskúlanum fyri yvir hundrað næmingum*

Mánakvøldið 4. februar var ferðaleiðarakvøld í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Tað var føroyska ferðaskrivstovan ”Tora Tourist Traffic” og ferðaleiðaraskúlin ”Service & Co” í Barcelona sum skipaðu fyri tiltakinum.

Súsanna Gunnarsson frá ferðaleiðaraskúlanum ”Service & Co” greiddi frá um skúlan í Barcelona, sum fleiri føroyskir næmingar hava gingið á. Eisini greiddu fleiri fyrrverandi næmingar frá um tað at vera føroyskur næmingur á skúlanum.



*Føroyingar sum hava gingið á ferðaleiðaraskúlanum í Barcelona f.v.: Elin Bærentsen, Barbara Joensen, Tórur D. Djurhuus, Magnus D. Madsen og Maibritt Magnussen*



*Skandinaviskir ferðaleiðarar hjá Service & Co, f.v.: Anna úr Svøríki, Súsanna úr Norra/Føroyum og Pauline úr Danmark*

Ferðaleiðaraskúlin ”Service og Co” upplærir ferðaleiðarnar til tey størstu og mest væl umtóktu ferðaliðini í øllum Skandanavia. Súsanna sigur, at føroyingar hava góð kort á hondum, og teir eru væl umtóktir sum ferðaleiðarar, teir duga væl tey skandanavisku málini og kunnu tosa við øll og skilja danskt, norskt og svenskt, og tað er ein fyrimunur hjá teimum stóru ferðaliðunum.

Súsanna vitjar í hesum døgum á ymiskum skúlum kring landið og kunnar um hvørjir møguleikar føroyingarhava sum ferðaleiðarar. Í sínum starvi hjá ferðaleiðaraskúlanum í Barcelona, hevur Súsanna síðan juli 2007 arbeitt á skrivstovuni hjá Service & Co. í Århus. Áhugaðir føroyingar kunnu tí venda sær til skrivstovuna og fáa upplýsingar á føroyskum á tel. +45 70211222.

Upplýsingar eru at finna á heimasíðuni: *www.guide.fo.* Eisini ber til at senda spurningar til: *info@service-co.dk,* har svar fæst innan 48 tímar.

**mg**

## … Prát við praktikantar úr Vágs skúla

**PRAKTIKANTAR**
*Olivia B. Tausen og Selma Poulsen*

*Hvussu eita tit?*
Vár Vestergaard og Barbara Finnbogadóttir Jensen.

*Hvar eru tit í starvsvenjing?*
Í Drotning Ingridar M. barnagarði.

*Hvat hava tit gjørt hesar dagarnar?*
Spælt við børnini, gingið túr, tekna, spælt sjónleik og mála tunnur og klipt grýluskortar, nú tað stundar mótur føstulávint.

*Hvussu dámar tykkum og hvat er tað besta tit hava gjørt?*
Okkum dámar ógvuliga væl og alt hevur verið gott.

*Er hettar nakað tit høvdu vilja gjørt í framtíðini?*
Vár: Ja, møguliga. Barbara: Nei, ikki heilt, men mær dámar væl her.

*Hvar ætla tit tykkum næstu ferð?*
Tað fer tíðin at vísa. Vit vita ikki enn.



*Barbara Finnbogadóttir Jensen og Vár Vestergaard*

